# JÓLAMAÐURIN BÝR Í GRØNLANDI

HVAT MEIRA **ÆVINTÝRKENT** KANST TÚ SUM **FERÐAMANNASTJÓRI** YNSKJA TÆR **ENN** AT KUNNA **MARKNAÐARFØRA** EITT LAND VIÐ SJÁLVUM **JÓLAMANNINUM**, SUM MILLUM **BØRN** KRING ALLAN HEIM ER **VORÐIN** SJÁLV ÍMYNDIN AV **JÓLAHÁTÍÐINI**! TA GÁVUNA HEVUR **FØROYSKI** LEIÐARIN Á **KONTÓRINUM** HJÁ **JÓLAMANNINUM** Í **NUUK**, **THERESA KREUTZMANN** FINGIÐ.



**ÆVINTÝR**

**Jan Müller**
jan@sosialurin.fo

Tað er 1. desember í tí góða ári 2010. Vit eru stødd á postkontórinum hjá jólamanninum í Nuuk. Vit – tað eru dagligi leiðarin á hesum sjáldsama og einasta kontóri av sínum slag í heiminum, føroyska Theresa Kreutzmann og so miðlamaðurin úr Miðlahúsinum í Havn.

Hví júst vitja eitt postkontór í Nuuk í Grønlandi hesa ársins tíð kundi verið spurt. Svarið er púra greitt. Tí hetta er eitt so einastandandi uppfinnilsi, at mong munnu teir býir og lond vera, sum øvunda Grønlandi hetta tiltak, sum eftir øllum at døma er komið fyri at verða.

Onnur lond sum t.d. Finland hava roynt at taka patent uppá jólamannin, men tað bleiv also Grønland, sum vann hesa kapping – við íblástri og eini hjálpandi hond frá heimskenda Disney. Tá hann í sínum víðagitnu teknifilmum gjørdi Norðpólin til heimstaðið hjá jólamanninum lá tað so ræðið fyri hjá grønlendingum sum næsta bygda granna at gerast veruliga livandi og fólksliga heimstaðið hjá hesum fyri øll heimsins børn felags vini. Ì dag halda nevniliga tey flestu, at Grønland er veruliga heimstaðið hjá jólamanninum.

Ein kann vissuliga siga, at hetta er branding, sum vil nakað. Og hetta tiltakið hevur síðani bara vundið uppá seg fyri hvørt ár. Grønlands er heimsins størsta oyggj, har tað tó flestu staðni er illa framkomiligt. Tí hevur jólamaðurin sjálvandi eina postadressu, og hon er 2412 Nuuk. Og tað man neyvan vera nøkur postadressa hjá børnum í heiminum, sum er vorðin meira brúkt enn júst henda.

### Føroyska Theresa

Og at standa á odda fyri hesum forvitnisliga og øðrvísi tiltakinum hava grønlendingar sett tí føroysku kvinnuna Theresu Kreutzmann, sum sjálv heldur, at hon hevur fingið eitt tað besta arbeiðið í verðini.

Arbeiðið fevnir m.a. um at lata upp øll tey forvitnisligu brøv, sum børn úr øllum herðashornum í heiminum senda til kontórið hjá jólamanninum í Nuuk.



*Theresa Kreutzmann og heimskendi postkassin hjá jólamanninum í Nuuk*
*Mynd: Jan Müller*

Í brøvunum eru allir hugsandi lutir til jólamannin.

Tiltakið er vorðið ein so mikið stór succes, at tey á postkontórinum í Nukk hava fingið ikki sørt av høvuðbrýggi av tí stóra áhuganum, sum tiltakið hevur fingið, og sum tí krevur alsamt meiri pening og orku at umsita.

Børn, sum skriva til jólamannin, hava higartil øll fingið svar, men tað er vorðið sera kostnaðarmikið at skula svara øllum, nú hvørt bræv kostar bara í frímerkjum 10 kr.

– Vit royna tó enn at svara aftur uppá brøvini og kortini, tí bæði Nuuk býur og handilslívið í býnum royna at stuðla hesum, men tað verður torførari og torførari at svara øllum brøvunum, sum bara blíva fleiri og fleiri, ja upp í 30.000 higartil í ár. Í dag hava vit júst fingið ein sekk frá postverkinum, og helvtin av honum var úr Taiwan. Í tí partinum av verðini er tað rættuliga stórur áhugi fyri jólamanninum, hóast Grønland liggur so langt burturi. Tá so fólk haðani vitja her keypa tey sjálvt danskar bøkur um jólamannin, sum tey so fáa yvirsett, tá tey koma heim.

### Stóran týdning

Tað at man kann marknaðarføra Grønland sum bú- og heimstaðurin hjá jólamanninum hevur eftir øllum at døma ómetaliga stóran týdning fyri Grønland. Ein kanning er gjørd, har spurt verður, hvaðani børnini halda jólamaðurin kemur, og har eru tað framvegis 90%, sum siga, at jólamaðurin kemur úr Grønlandi.

Fyri 20 árum síðani varð Santa Claus Greenland Foundation sett á stovn fyri nettupp at kunna liva upp til ta vón man hevði givið heimsins børnum um, at heimstaðurin hjá jólamanninum var Grønland. Tá var ein sera flottur jólapakki sendur út til børn, sum skrivaðu til jólamannin í Grønlandi, men tað skuldi vísa seg at gerast alt ov dýrt í longdini, jú meira vælumtókt hetta tiltak bleiv. So tað er man farin burtur frá, soleiðis at man í dag roynir at svara øllum brøvunum heldur uttan nakra gávu.

Theresa leggur aftrat, at tey fáa eisini rættiliga nógv brøv úr Føroyum.

### Barnadreymur gerst veruleiki

Eingin ivi er um, at hetta tiltakið, har